# Mín besta uppskrift

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos



UPPSKRIFT: Silvia Petersen

## Heitur rækju-rættur (til 2 pers.)

500 g frísk pasta (kryddra)

**Sós:**
250 g av frísk sjampignon
3 fet av hvítleyki
1 dl av hakkaðum persillu
125 g av rækjum
2 dl av súrróma 38%
½ dl av parmesanosti
Oregano og salt
Olivenolja

Kóka pastuna.
Svitsa sjampignon saman við tí pressaða hvítleykinum.
Lat persillu og rækjurnar í blandingina og lat síðan simra í 5-7 minuttir.
Koyr súrróman í saman við tí rivna parmesanostinum, og lat nú alt simra eina løtu, til tað fær ein kremutan konsistens.

Servera við pasta, ruculasalat og italskum breyði.

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.


Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04




*Remee hevur brúkt pengar í eyst og vest, men tað má steðga, heldur hann sjálvur*

# Remee hevur brúkt ov nógvar pengar

HANN HEVUR FORVUNNIÐ NÓGVAR PENGAR, MEN HANN HEVUR DUGAÐ SO ILLA AT UMSITIÐ TEIR, AT HANN NÚ MÁ SETA LIVISTØÐIÐ NIÐUR OG SELJA OGNIR HJÁ SÆR

**REMEE**


Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo


Hann telist millum kendastu fólkini í Danmark, eftir at hann hevur verið sjónligur dómari í sjónvarpskappingini X Factor, sum hevur havt omanfyri tvær milliónir hyggjarar.

Hann er eisini fast inventar í bløðum og avísum í Danmark, og hann smæðist ikki at stilla seg fram við persónligum søgum og útsøgnum.

Og nú hevur blaðið BT tosað við Remee um hansara ov stóra pengaforbrúk. Í BT mikudagin greiðir Remee frá, at hann víst hevur forvunnið nógvar pengar seinnu árini, men hann hevur dugað illa at forvalta hesar pengar, og tí hevur hann brúkt meira, enn hann hevur forvunnið.

### Seldi eitt hús

Remee hevur mist nógvar milliónir orsaka av vánaligum metingum, sløsi og stórum persónligum forbrúki.

– Eg havi verið vanur við at bjóða 20 fólkum til døgurða, ferðast kring heimin og bestilla ferðaseðilin dagin fyri – og eg hevði ikki tímað at tikið havamøblarnar inn, tí eg kann bara keypa nýggjar næsta ár. Nú er liðugt við øllum hesum, sigur Remee við BT.

Remee er ikki verri staddur enn so, at hann hevur ognir, sum hann kann sleppa sær av við. Herfyri vóru pengarnir hjá Remee uppi, og tá setti hann eina villa til sølu fyri 14 milliónir krónur. Men hann viðurkennir eisini, at ovurhonds stóra forbrúkið má steðga.

Remee hevur eisini brúkt av sínum egnu pengum til X Factor luttakararnar, sum hann hevur havt um hendi – millum annað Annu Nygaard. Í fjør brúkti Remee umleið eina hálva millión krónur av sínum egnu pengum til X Factor kappingina.